# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Obama hevur góða heilsu, so fólk kunnu trygt velja hann. Menn hann hevur ilt við at sleppa roykingini*

*David T. Scheiner, lækni*



*Bizunesh Hidana vigaði minni enn átta pund, tá hon kom á hjálparstøðina (*

*Mynd: AP*

## Hon er trý ár og vigar átta pund

**Í Etiopia hava seks milliónir børn tørv á hjálp sum skjótast**

Tann trý ára gamla Bizunesh Hidana var heppin at koma á eina hjálparstøð hjá UNICEF, tí tað var í tøkum tíma. Hjálparfólkini staðfesta, at hon var stak illa fyri. Hóast hon er trý ára gomul, vigaði hon minni enn átta pund.

Bizunesh Hidana er eitt av teimum hepnu etiopisku børnunum. Sambært UNICEF stendur Etiopia á gáttini til ta ringastu menniskjaligu kreppuna í mong ár. Umleið seks milliónir børn hava alt ov lítið til matna, og av teimum eru 176.000 sera illa stødd og hava tørv á hjálp alt fyri eitt.

- Orsøkin til ta vanlukkuligu støðuna er áhaldandi turkur har suðuri í Etiopia, og tann hækkandi matvøruprísurin á altjóða marknaðinum bøtir ikki umstøðuna, sigur Etiopia-umboðsmaðurin hjá UNICEF, Björn Ljungqvist, við Aftenposten. Í síðstu viku fekk UNICEF 90 tons av mati og aðrari neyðhjálp, og stovnurin sigur seg hava tørv á 1.800 tonsum teir næstu tríggjar mánaðirnar.

Felagsskapurin Læknar uttan Landamark ávarar eisini um støðuna har suðuri í Etiopia. Felagsskapurin hevur verið virkin í Etiopia síðani 1984 og hevur í løtuni umleið 800 starvsfólk í landinum.

- Vit hava sæð nógv børn og serliga smá børn, sum hava alt ov lítið til matna, sigur ein talsmaður hjá læknunum við Aftenposten. Fyri fjúrtan døgum síðani skipaði felagsskapurin tríggjar viðgerðarstovur til børn, og í løtuni fáa 435 børn viðgerð har.

## Evropear vilja hava Obama

**Skuldu evropear valt millum Barrack Obama og John McCain, hevði Obama vunnið við stórum meiriluta**

John McCain er eftir øllum at døma ikki avhildin maður hesumegin Atlantshavið. Í øllum førum vísir ein meiningakanning, at í Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi, Italia og Russlandi vilja fólk nógv heldur hava Barrack Obama til amerikanskan forseta aftan á valið í heyst.

Samanumtikið siga 52 prosent av teimum spurdu, at tey vilja hava Obama í Hvítu Húsini. Bara 15 prosent halda, at McCain eigur at flyta inn hagar.

Barrack Obama er serliga avhildin í Týsklandi og Fraklandi, har ávikavist 67 og 65 prosent vilja hava hann til amerikanskan forseta. Harðastu kappingina fær hann í Russlandi, har 31 prosent siga seg styðja Obama og 24 prosent McCain.



*Barrack Obama er avhildin maður í Evropa*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Irakar skylda nógv

Irak skyldar sínum arabisku grannum meiri enn 67 milliardir dollarar, og landið skyldar eisini fleiri øðrum londum pengar. Nú sigur forsætisráðharrin, Nouri Maliki, við BBC, at hann og stjórnin ætla sær at biðja grannarnar og altjóða samfelagið strika ein part av skuldini. Amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, hevur heitt á heimsins tjóðir um at hjálpa irakska fólkinum at byggja landið uppaftur, og tað kann millum annað gerast við at lætta um skuldina hjá landinum, sigur hon. Spurningurin um iraksku skuldina verður viðgjørdur á ráðstevnu í Svøríki í hesum døgum, har umboð fyri umleið 100 lond tosa um, hvussu Irak skal endurbyggjast eftir kríggið.

### Dýrur diamantur



*Diamanturin í Hongkong fór fyri 500 milliónir dollarar*

*Mynd: AP*

Í vikuni varð ein óvanliga stórur diamantur seldur á uppboði í Hongkong. AP-tíðindastovan skrivar, at diamanturin er til støddar sum ein borðtennisbóltur. Hann er 101 karat og tann fjórði í heiminum, sum er oman fyri 100 karat. Á uppboðnum í Hongkong fór hann fyri góðar 500 milliónir dollarar. Upprunaliga stavar diamanturin úr einum námi í Suðurafrika. Hetta er ikki tann fyrsti diamanturin, sum er funnin har, og tann størsti óslípaði diamanturin í heiminum, Cullinan-diamanturin, varð funnin í sama námi.